


Afstöðumynd af Drekasvæðinu - kortlagt svæði er innan gulu strikalínanna.

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 02 - 2013

# Íslendingar fyrireika oljutilbúgving

Ellivu almennir stovnar í Íslandi hava nú skipað eitt arbeiðsbólk, sum skal umrøða ymisk viðurskifti í sambandi við tær ætlaðu oljuboringarnar á Drekaleiðini. Millum stovnarnar eru Orkustovnurin, Umhvørvisstovnurin og Havrannsóknarstovnurin. Guðni A. Jóhannesson, orkumálastjóri, sigur við Morgunblaðið, at íslendingar átaka sær eina stóra ábyrgd, um farið verður undir oljuvinnu á Drekaleiðini. Hann sigur, at tað er umráðandi at brúka ta tíðina, sum er til taks, tí eftir ætlanini verður tann fyrsti borurin settur í havbotnin í 2016 ella 2017. Byggi- og brunaeftirlitið er eisini umboðað í arbeiðsbólkinum. Stjórin, Björn Karlsson, sigur við blaðið, at teirra arbeiðið snýr seg serliga um tiltøk í sambandi við dálkingaróhapp og tilburðir, har mannalív eru í vanda. -Eru mannalív í vanda so langt norðuri í havinum, mugu vit hava tyrlur. Er talan um dálking, mugu vit fáa serliga útgerð og hjálp frá altjóða samfelagnum sigur Björn Karlsson. Faroe Petroleum er eitt av oljufeløgunum, sum hevur leitiloyvi í Íslandi.